DAGSINS MEINING

Ráðstevna og framtíðar útlit

Hetta er tíðin, tá ymsar ráðstevnur verða hildnar heima sum burturi. Ein afturvendandi ráðstevna av hesum slag er "Offshore Faroes", ið Oljuvinnufelagið skipar fyri. Nú oljutilgongdin líkasum er í einum aldudali verður henda afturvendandi ráðstevna bert at vara í ein dag, tann 2. desember í Norðurlandahúsinum.

Hóast eitt slag av naggatódn er í tilgongdini, nú eingin brunnur verður boraður komandi tvey árini, so er tó ikki orsøk at geva skarvin yvir. Vit mugu venja okkum til og læra av øðrum, at oljuleiting er nakað, sum tekur tíð, nakað, sum krevur tol og treiskni.

Tað er tó við hetta vegamótið, har helvtin av brunnunum í 1. útbjóðing er borað, at Oljumálaráðið ynskir at taka pulsin á oljufeløgunum og vita, um tey eru hugað fyri enn eini útbjóðing, sum gevur teimum møguleika at peika út onnur øki á landgrunninum, ið kunnu vera áhugaverd. Uttan iva er tað rætt av myndugleikunum at "sondera terrengið". Men tað kann eisini vera ein boomerangur ella nakað, sum líkist gambling. Tí skuldi tað hent, at oljufeløg, sum heild lítlan og ongan áhuga hava fyri eini nýggjari útbjóðing beint nú, so kann tað verða tikið sum eitt minus ella bakkast fyri okkara øki. Tað er eisini ein vandi í tí, at tað júst um hetta mundið eisini verða tilrættalagdar útbjóðingar bæði í norskum og bretskum øki. Spurt kundi tí verið, um oljufeløgini tá hava so nógv um at vera, at tey heldur velja føroysku útbjóðingina frá?

Nettupp umrødda útbjóðing verður eitt av evnunum á oljuráðstevnudegnum í desember og verður tað áhugavert at hoyra okkara egnu myndugleikar bæði grundgeva fyri hesi útbjóðing og meta um hana, umframt at tað sjálvandi verður áhugavert at frætta, hvat oljufeløgini sjálvi hava at siga.

Sum skilst vil OMR við sínum útspæli fyrst og fremst lodda dýpið, og tað er helst skilagott. Tí vísir tað seg, at áhugin er ikki tann stóri beint nú, so ber sjálvandi til at steðga á og útseta útbjóðingina til seinni. Tað er greitt, at tað er ikki lætt at marknaðarføra okkara landgrunn við avmarkaðu úrslitunum higartil og nú tá basaltgátan framvegis ikki er loyst. Kanska hava oljufeløgini nettupp fyri neyðini meiri tíð til at arbeiða við at loysa basaltknútin tvs. bæði at kunna síggja betri gjøgnum basalt og at kunna bora skjótari eisini.

Við ringu royndunum aðrastaðni, eitt nú í Írlandi, Grønlandi og Falklandsoyggjunum at skapa áhuga fyri nýggjum leitiøkjum eftir turrar brunnar, so er tað skilligt, at OMR hevur onga lætta uppgávu. Men helst er rætt nú at vita, hvar oljufeløgini standa í løtuni og út frá tí leggja eina framtíðar strategi fyri leiting á øllum landgrunninum. Tað kann eisini vísa seg at vera skilabetri at bora teir írestandi fýra brunnarnar fyrst og tá raka rætt, heldur enn nú at fara undir at bjóða út undir kanska heilt øðrvísi treytum, sum í framtíðini kunnu vísa seg skeivar. Men er tað so, at feløgini, sum hava loyvi, hava ilt við at finna prospekt tvs. nóg góð mál at fara eftir í verandi loyvum, er eyðsæð, at okkurt má gerast. Miðjan desember skulu oljufeløgini hava latið inn síni boð til eina nýggja útbjóðing. Spennandi verður at frætta.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Landsstýrismaðurin sendi sjálvur stóra persónsdataskrá av landinum til danskan stovn at umsita

Hans Pauli Strøm
fyrrv. løgtingsmaður

Tað er ikki annað enn konservativur ostaklokkupolitikkur hjá landsstýrismanninum í lógarmálum at forbjóða menningarmøguleikunum hjá føroyskum datafyritøkum í kunningartøkniligum samskifti við útlond. Og tá ið landsstýrismaðurin nú kemur við tjóðskaparligum grundgevingum fyri sínum vinnupolitiska afturhaldi, blívur tað til reint hyklarí.

Í bløðunum sigur landsstýrismaðurin, at "Tað avgerandi er at vit varðveita persónsupplýsingar undir føroyskum lóggávuvaldi. Tað gera vit neyvan, um alt so líðandi fer av landinum".

Men sjálvur tók landsstýrismaðurin fyri 3 árum síðani stig til at øll tinglýsingarskipanin - ein av størstu persónsupplýsingarskráunum - varð send til Danmarkar at umsita. Har er hon mær vitandi enn.

Á vári 2000 legði landsstýrismaðurin uppskot fram um at broyta tinglýsingarlógina í samband við at leggja tinglýsingina á edv. Grundin til uppskotið var, at ríkismyndugleikarnir vóru í ferð við at leggja alla donsku tinglýsingina á edv, og bjóðaðu danir sær at taka føroysku tinglýsingina við uttan kostnað. Ein av avleiðingunum fór at verða, at føroyska tinglýsingin so kom at verða ein partur av donsku tinglýsingarskipanini, og kom at liggja á hóvuðsteldu í Danmark, umsitin av donskum myndugleikum og undir eftirlitið av donskum myndug-leikum.

Rættarnevndin vildi ógviliga treyðugt, at tinglýsingin varð flutt av landinum í hesum sambandi. Vit vildu heldur hava, at ein føroysk edv-skipan av tinglýsingini varð gjørd. Landsstýrismaðurin vísti tó á fyrimunin við at fáa danir til at gera umleggingina til edv skjótt og ókeypis. Og tá hann lovaði rættarnevndini, at beinanvegin skuldi farast undir at gera eina føroyska skipan, so at tinglýsingin kundi takast heimaftur til Føroya, so skjótt danir høvdu lagt hana um til edv, so gav rættarnevndin seg fyri ynskinum hjá landsstýrismanninum.

Nú eru meir enn 3 ár farin, og mær vitandi liggur føroyska tinglýsingin enn í Danmark. Hetta er sanniliga skrá við persónsupplýsingum av størsta týdningi, tí tinglýsingin fevnir um almennu skrásetingina av øllum skjølum viðvíkjandi rættindum í fastari ogn og øðrum ognarviðurskiftum hjá persónum í Føroyum.

Tinglýsingin verður umsitin ólógliga í Danmark

Í upprunauppskotinum hjá landsstýrismanninum um edv-umlegging av tinglýsingini varð skilt millum fyrsta floks brúkarar (advokatar, peningastovnar, grannskoðarar o.t.) og annan floks brúkarar ("vanlig fólk") av tinglýsingini - tey fyrru skjóta og lætta atgongd til upplýsingarnar, tey seinnu tvørliga og kostnaðarmikla. Men rættarnevndin strikaði hendan mismunin á brúkarunum, so øll skulu hava somu, javnbjóðis atgongd til hesa almennu skrá. Samstundis strikaði rættarnevndin byrokratiskar reglur um ymisk sløg av atgongd via terminalar, tí slíkt var tøkniliga avoldað og avmarkaði fríu atgongdina til upplýsingarnar. Í staðin samtykti løgtingið stutt og greitt í §50c, at: "Upplýsingar í edv-skrá (av tinglýsingini) eru atkomiligir hjá øllum á internetinum".

3 ár eru farin, men enn er hetta kravið í lógini ikki uppfylt. Og síðst eg kannaði málið varð teldutøka tinglýsingin umsitin púra í mótstríð við lógina:

- Sjálv tinglýsingarskráin og praktiska umsitingin av henni liggja hjá tí danska CSC-Danmark A/S (fyrrverandi Datacentralen) og Tingbogskonverteringen í DK, meðan eftirlitið liggur hjá Forsetanum fyri Eystara Landsrætt.
- Uttan at lógarheimild er fyri tí, skulu brúkarar, sum vilja hava atgongd til tinglýsingina um netið, biðja um eina umsókn frá tinglýsingarskrivstovuni um at verða skrásettir sum brúkarar, og umsóknin skal góðkennast hjá Tingbogskonverteringen í Árhus. Hetta kann taka fleiri vikur.
- Uttan at lógarheimild er fyri tí, verður av CSC A/S uppkravt eitt sonevnt íbindingargjald uppá 2000 kr, fyri at gerast internetbrúkari.
- Uttan at lógarheimild er fyri tí, skal haraftrat gjaldast til CSC A/S eitt fast mánaðargjald uppá 110 kr, umframt eitt brúkaragjald uppá 3,25 fyri hvønn byrjaðan tíma.

Hetta hevði verið nakað hjá fjølmiðlunum at kanna, um hetta framvegis er galdandi! Eg havi í hvussu er onki frætt um at nakað er broytt.

Er tað enn so galið, so er tað álvarsligt! Øll henda mannagongdin er greitt í stríð við lógina, tí tá hon sigur, at tinglýsingin "í edv-skrá skal verða atkomilig hjá øllum", so er ikki heimild fyri at krevja serliga umsókn og góðkenning, og tað er ikki heimild til at krevja serligt haldaragjald. Lógin sigur at tinglýsingin skal vera almenn, og ein og hvør skal uttan víðari kunna leita upplýsingar fram í edv-skránni. Skal ávíst gjald takast fyri hetta, skal tað gerast við heimild í lóg, og slík er ikki.

Landsstýrismaðurin hevur ikki megnað at fingið hesi viðurskifti í rættlag. Hann sendi tinglýsingina av landinum og hevur ikki megnað at fáa hana aftur á føroyskar hendur, so hon kann verða umsitin eftir lógini og koma undir eftirlit av føroyskum myndugleikum. Tað átti hann og fyrisiting hansara at brúkt kreftirnar uppá, heldur enn henda undarliga og óforstáiliga ostaklokkupolitikkin móti Elektron.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fríg. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Heimsins nekari

Sonni Jacobsen

Lítil viðmerking til yvirlýsing í bløðunum nú um dagarnar frá Kvinnufelagnum í Havn um "kvinnunnar rætt til hennara egna kropp".

Fyri umleið 30 árum síðan sang ex-beatlin John Lennon í einari solo útgávu sangin "Woman is the nigger of the world" í einum vælskrivaðum sangi um kvinnukúgan.

Soleiðis at sammeta kvinnuna tá við "nekaran", t.v.s. trælin og tann kúgaga, var ein rættuliga rámandi mynd og mundi eisini fáa mangan mannin at rakna við og at síggja støðuna hjá kvinnuni sum hon var. Ískoytið hjá Lennon var bert eitt av túsundtals ískoytum frá bæði kvinnum og monnum gjøgnum ártíggir, sum spakuliga men sikkurt opnaðu eyguni fyri støðuni hjá kvinnuni sum hon var og sum hon átti at verið.

Í dag hugsi eg, at flest øll munnu vera samd um, at støðan hjá kvinnuni er munandi betra og at kvinnan á øllum økjum hevur somu rættindi sum maðurin, um hon veruliga ger sína støðu og sín rætt galdandi. Eg hugsi, at flest øll, bæði menn og kvinnur í dag ynskja, at kvinnan á ein demokratiskan hátt skal hava javnrætt bæði til løn, arbeiði og til vald. Hetta var ikki støðan bara fyri fáum árum síðan so har hevur maðurin (og mangar kvinnur við) veruliga flutt seg. Tá hugsanin kemur til arbeiði og vald so hugsi eg eisini, at tey flestu ganga inn fyri hugsanini, kvalitet fram fyri kvantitet. T.v.s. ikki 50 prosents regluna, sum fleiri kvinnufylkingar tala fyri, men at best egnaði persónurin (ella tann, sum t.d. fær flest atkvøður til eitt val) fær eitt starv ella ein politiskan post. T.v.s. ein kvinna fær ikki eitt starv bert tí hon er ein kvinna, ein maður fær ikki eitt starv bert tí hann er ein maður. Kynnini vera "nullstilla" og tann best egnaði ella tann best umtókti (t.d. í politikki) fær starvi.

Eg eri samdur við Kvinnufelagnum í Havn um, at sjálvandi hevur kvinnan rætt til sín egna kropp. Men so má eg eisini siga, at tað hevur ófødda barni eisini. Og forrestin so eru 50 prosent av ófødtu børnunum kvinnur. Hevur kvinnufelagið ogna ábyrgd fyri teimum kvinnunum?

Fyri at seta sakina eitt sindur í perspektiv kundi eg spurt: Fái eg ein gest, sum onga aðrastaðni hevur at vera í 9 mánaðir, skuldi eg so kunna blaka hann út, um eg visti, at tað var tann vissi deyði fyri hann, bert "tí eg havi rætt til mítt egna heim"? Hevði eg onga ábyrgd havt fyri hesum gestinum, sum onga aðrastaðni hevði at vera? Ella, kunnu vit eisini siga: Hvussu egoistisk, hvussu ábyrgdarleys, hvussu hjartaleys kunnu vit loyva okkum at vera?

Spurningurin hjá mongum er eisini: Er ófødda barni eitt menniskja? Nú eri eg ikki serfrøðingur, men hyggur tú at mynd av einum fáar vikur gomlum fostri so líkist tað einum menniskja... Tað hevur høvd, eygu, nøs, munn, oyru, kropp, armar, hendur, fingrar, bein, tær og allar kropslutir annars. Serfrøðingarnir siga, at hetta er eitt menniskja og eg hugsi, at sjálvt tann mest sannførda kvinnufelagskvinnan í Havn, um hon sá eitt fostur andlit til andlits, hevði sagt, at hetta var eitt menniskja.

Næsti spurningurin er so, er tað loyvt at drepa eitt menniskja?

Okkara lóggáva sigur, at tað er ikki loyvt at drepa eitt menniskja — enn ikki ringasta brotsmenni er tað loyvt at taka av døgum. Og hetta er stoðan í flest øllum framkomnum demokratiskum londum og vit eru flest øll samd um, at soleiðis skal tað vera.

Persónliga eri eg ímóti deyðadómi — eisini fyri tey ófoddu, tí skrivi eg hesa viðmerking.

Ein kundi spurt: Skal ófødda barni (við avgjørt reinari straffiattest) hava verri rættindi enn ringasta brotsmenni? Hetta sýnist Kvinnufelagið í Havn í øllum førum at halda?

Fyri ikki so mongum árum síðan segði man, at tað var loyvt og tað var rætt at halda nekarar trælir og ein kundi fara við teimum sum einum lysti, bert tí teir vóru nekarar. Tú kundi vera góður við teir ella tú kundi vera eitt beist ímóti teimum. Teir vóru "tínir nekarar", hevði tú goldið fyri teir. Alt hetta, bert tí teir vóru nekarar. Tí tey vóru nekarar og vóru svørt skuldu tey gera hvíta menniskjanum til vildar uttan at hava nøkur rættindi á nakran hátt.

Tíbetur vóru tað bæði menn og kvinnur, sum fingu eyguni upp fyri, at hetta var ikki rætt. Tú kundi ikki fara við einum menniskja á henda hátt, bert vegna rasu og húðalit. Í Amerika brast enntá borgarakríggj á vegna hesa søk. Støðan hjá nekarunum er broytt til tað betra um hon ikki er so góð sum hon átti, tey eru frí, tey hava síni demokratisku rættindi.

Er støðan hjá ófødda barninum í dag nógv annarleiðis enn hon var hjá nekaratrælunum tá?

Hvørji rættindi hevur ófødda barni?

Hvussu upplýst, hvussu klók, hvussu frammarlaga, hvussu góð, javnstøðu sonn, hvussu demokratisk, hvussu elskilig eru vit, tá vit fara verri við okkara minstu enn við okkara ringastu brotsmonnum?

Kann ófødda barni í dag ikki av sonnum nevnast "heimsins nekari"?

Ríkisfelagsskapurin heimsins besta skipan

Kaj Leo Johannesen
Sambandsflokkurin

Vit eru vanliga á einum máli um at vit liva í heimsins besta landi, so er spurningurin um ikki fyritreytin fyri at liva í einum so góðum landi, er ein politisk skipan ella ein politiskur felagsskapur, sum vit við góðari samvitsku kunnu kallað ein av teim bestu í heiminum, tú kanst ikki hava eitt gott land, uttan eina góða politiska skipan, tað er ikki møguligt, tað hevur søgan prógvað.

Hvør er tað sum forðar okkum at gerða sum vit vilja, eri glaður og stoltur at verða føroyingur, havi havt og havi persónligt frælsi at gerða alt tað, eg havi havt hug til gjøgnum lívið, havi ongantíð kent meg kúgaðan av dønum, ella nøkrum øðrum, havi kent meg frælsan og havi skilt, sæð og upplivað at føroyingar eru millum frælsastu fólkasløg í heiminum.

Heitið ella floskilin um hvat frælsi/fullveldi er, tað kunnu serfrøðingar í altjóða rætti útgreina, eitt nú hvørt talan er um nationalt frælsi ella persónligt frælsi.

Tað hevur stóran týdning at halda givin lyfti, og taka ábyrgdina av sínum gerðum, tað er hópin lættari at finnast at og pástanda at hettar ella hattar ikki er gott, mín áheitan til fullveldispolitikarnir í samgonguni er at halda uppat at niðurgerða tað skipan sum hevur verði karmurin um okkara vælferðarsamfelag fram til dagin í dag, og sum vit øll hava notið gott av.

Og um nakar kundi víst mær ítøkiligt dømi um atgerð frá teimum sum hava skert inntøkugrundarlagið við knappari hálvari milliard, sum miðar móti at gera Føroyar meira sjálvberandi, so hevði eg fegin vilja sæð tað á skrift.

Trupulleikin er ikki skipanin, men vit politikarir tað prógvaðu 80´ini.

Høgni villeiðir í Elektron málinum

Bárður Nielsen
løgtingsmaður



Høgni Hoydal villeiðir fólkið í málinum við Elektron og PBS. Hann brúkar rættarnevndina og harvið Løgtingið, sum undanførslu fyri at gottgera at hann hevur sett kunngerðina í verk, ið forðar peningastovninum at útbyggja gjaldsskipanina saman við PBS.

Trupulleikin er bara tann, at hann má heilt aftur til rættarnevndina, ið sat í 2001 at fáa alibi. Sum øllum kunnugt hevur val verið síðani og nú er ein nýggj rættarnevnd, ið hevur viðgjørt málið aftur í síðstu tingsetu, men kom ikki aftur í Tingið við málinum, áðrenn Tingið fór í summarfrí.

Semja fekst ikki um málið og nevndin var samd um at málið ikki var búgvi at fara niðan aftur í Tingið, tí at tað var ivi um lógarbroytingin var uttan fyri endamálið í lógini, ið er at verja persónsupplýsingar, og ikki at verja ein part av vinnulívinum. Ein onnur orsøk var, at avleiðingarnar av lógini verða stórar fyri peningastovnarnar og uppá longri sikt eisini fyri aðrar fyritøkur, tí vandi er fyri, at vit ikki klára at fylgja útviklinginum og kostnaðurin pr. transaktión verður tískil hægri. Tað merkir at kundarnir skulu gjalda eitt hægri gjald fyri tænasturnar enn í dag.

Hetta er ein undarligur og snævurskygdur hugburður, at gera verjugarð um okkara vinnulív. Í londunum rundan um okkum verður hildið, at tey eru ov smá at røkja hesar uppgávur og verður tí í størri og størri mun lagt saman í ein felagscentral fyri fleiri lond.

Landsstýrismaðurin setti síðani av sínum eintingum kunngerðina í verk, ið forðar peningastovninum at útbyggja gjaldsskipanina saman við PBS. Hetta er maktmisnýtsla so tað stendur eftir. Tað hann ikki fær ígjøgnum í Løgtinginum, setir hann bara í eina kunngerð. Óhugnaligt ! Men dugnaligur demagogur sum Høgni er, hevur hann inntil nú klárað at villeitt bæði fólkið og fjølmiðlarnar við at siga, at hetta hann hevur gjørt er løgtingsins vilji. Men hetta er beinleiðis ósatt, tí núverandi rættarnevnd hevur eina heilt aðra støðu. Landsstýrismaðurin kundi heldur lagt málið fram aftur nú, soleiðis at Løgtingið fær viðgjørt málið, og so kann hann handla eftir tí nýggju niðurstøðuni hjá Løgtinginum.